# MENTAMÁLARÁÐIÐ

## Stuðul til myndlistafólk – endurlýsing

Peningur er settur av á løgtingsfíggjarlógini til stuðul til myndlistafólk. Myndlistafólk kunnu søkja um stuðul til útbúgving, skeið og námsferðir.

Tá stuðul verður játtaður, verður í fyrstu atløgu raðfest at veita yrkislistafólkum stuðul og í aðru atløgu umsøkjarum, ið eru á eini listaligari yrkisleið. Tøka játtanin er kr. 135.600.

Endamál, sum stuðul kann verða játtaður til:

- Útbúgving innan myndlist (útreiðslur, ið ikki eru fevndar av øðrum stuðulsskipanum)
- Skeið á myndlistaøkinum (skeiðsgjald, uppihald og líknandi)
- Námsferðir innan- og uttanlands (ferðaútreiðslur, uppihald og líknandi)

**Freistin at søkja er 1. september 2019**

---

Allar umsóknir eiga at verða skrivaðar á serstakt umsóknarblað til endamálið. Umsóknarbløð og vegleiðingar eru at finna á heimasíðu okkara: *www.mmr.fo* ella kunnu fáast við at venda sær til:


**Mentamálaráðið**
**Postrúm 3279 - 110 Tórshavn**
**Telefon 30 65 00 – Telefax 30 65 55**
**e-postur.: mmr@mmr.fo**